# Nýggja barsilsskipanin revsar kvinnur

**Nýggja barsilsskipanin ger, at kvinnur, sum eiga børn við stuttum millumbili, og taka eyka farloyvi við vælsignilsi frá arbeiðsgevara sínum, tí tey ikki fáa barnið ansað orsaka av langari bíðitíð til stovnspláss, eru verri fyri í teirri nýggju skipanini enn teirri gomlu**



BARSILSSKIPANIN
*Ingrid Bjarnastein*

Grundin til, at kvinnur eru verri fyri er, at við tí nýggju skipanini skulu tær arbeiða eitt ávíst tíðarskeið fyri at forvinna sær rætt til nøktandi barsilsløn, sum svarar til inntøkurnar tær hava fingið.

Nýggja skipanin roknar barsilsløn út frá arbeiðsinntøkuni teir seinastu 12 mánaðarnar. Úr teimum 12 seinastu mánaðunum verða seks teir bestu samanhangandi mánaðirnir tiknir úr, og verður barsilslønin roknað út frá tí.

Um tú so ikki hevur 12 ella seks teir seinastu mánaðarnar at fella aftur á, kemur tú undir ein bólk, ið eitur »nýggj í starvi«, og verður barsilslønin roknað út frá trimum teimum seinastu arbeiðsmánaðunum. Um tú so til dømis bert hevur ein ella tveir mánaðar, verða teir tiknir og býttir við trý, fyri at fáa hesa tríggjamánaðaskipan at ganga upp.

### Bjargað av egnum sáttmála

Maria Heradóttir, sum er lærari í Hoydølum, er ein, sum á ein hátt verður revsað. Hon kundi í dag verið rakt meint, tí hon fyri góðum ári síðani longdi barnsburðarfarloyvi við 10 mánaðum. Hetta varð gjørt vegna vantandi ansingarpláss.

Maria Heradóttir er nú aftur við barn, men eftir nýggju skipanini hevði hon fingið verri barsilsløn hesuferð, um tað ikki var fyri hennara egna sáttmála, sum gevur henni rætt til fulla løn í 24 vikur eftir barnsburð.

– Eg varð noydd at leingja um farloyvið av tí, at eg ikki fekk nakað ansingarpláss til dóttrina. Hetta fekk eg loyvi til frá arbeiðsgevara mínum, við tí fyri eyga, at eg byrjaði aftur tann 1. august 2001, sigur Maria Heradóttir.

– Ætlanin var hesuferð at fara í farloyvi tríggjar vikur áðrenn eg skuldi eiga við løn, tí hesum loyvir nýggja skipanin, greiðir Maria frá.

– Men av tí, at eg bert hevði arbeitt ein mánaða, kundi hetta ikki lata seg gera, tí so hevði barilslønin verið alt ov lág. Eg hevði arbeitt eitt ov stutt tíðarskeið til at forvinna mær nøktandi barsilsløn. Sjálvt um eg hevði arbeitt hálvan annan mánaða, hevði eg bert fingið barsilsløn fyri ein. Hetta av tí, at skipanin telur ikki ein mánaða fyrr enn lønin er útgoldin, og tað er ikki fyrr enn síðst í mánaðanum. Tískil var tað ikki møguligt at gevast hálvan september.

Maria Heradóttir heldur, at hendan skipanin útihýsir kvinnur, sum eiga fleiri børn innan eitt stutt tíðarskeið. Eyka farloyvið, ið hon tók, fíggjaði hon sjálv.

– Tað tykist sum um skipanin nú revsar meg. Ikki bert meg, men eisini onnur, ið møguliga eru í somu støðu sum eg, sum hava verið noydd til at leingja um farloyvið, sigur Maria Heradóttir.

### Korini ov lítið at siga

Allir útvegir eru kannaðir, og einasta loysnin vísti seg at vera, at Maria arbeiddi inntil tveir mánaðar vóru farnir. Um hon var givin áðrenn hevði hon gingið nærum ein mánaða við eini løn, ið als ikki kann brúkast sum grundarlag fyri eina familju.

Maria Heradóttir sigur, at tað hevði komið sum ein dyggur smeitur, um hon bert hevði fingið barsilsløn fyri ein mánaða. Hennara løn er høvuðsinntøkan í húsinum av tí, at maðurin er lærlingur.

– Ongin stuðul er fyri foreldur, ið velja at fara í farloyvi. Munur skuldi verið á, hví tú ert burtur frá arbeiðsmarknaðinum. Um tú velur tað, ella ert noyddur til tess, heldur Maria.

– Tú kanst ikki hugsa langt fram í tíðina, tað kann ikki vera rætt. Nær eg fái børn ella um tað kemur illa fyri, tí eg noyðist at hava arbeitt eitt ávíst tíðarskeið fyri at fáa eina barsilsløn, sum ein familja kann liva av, sigur Maria Heradóttir.

Sambært Mariu hava korini alt ov lítið at siga. Hon er bangin fyri, at um skipanin verður broytt aftur nú, so verður tað, ið kemur ístaðin uppaftur verri. Ein spurningur sum, hvat hevur ein barnafamilja brúk fyri, verður als ikki tikin upp. Tosað verður heldur um, um viðkomandi kostar ov nógv.

Hetta sigur so mikið sum, at fólk, ið eru í somu støðu sum Maria kunnu lættliga koma í klemmu av nýggju skipanini. Skipanin hevur eitt hol, har fólk, sum Maria Heradóttir lættliga kunnu detta ígjøgnum og koma illa fyri.



*– Tað tykist sum um skipanin nú revsar meg, sigur Maria Heradóttir í Havn.*



# Spekulatiónin skal burtur

*Nú skal endi fáast á spekulatión við almennum fiskiloyvum, lovar løgmaður*



**Tað skal ikki vera loyvt at spekulera við handilsligum vinningi av fiskiloyvum, sigur løgmaður. Tað kemur at standa í nýggjari lóg um vinnuliga fiskiskap, sum ætlandi kemur í gildi á nýggjárinum**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*

Spekulatióni við vinningi av at selja fiskiloyvi skal gerast ólóglig, sigur løgmaður. Nýggj fiskivinnulóg er á veg, og har verður tann møguleikin tikin burtur.

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, hevur í samband við fyrstu viðgerð av fíggjarlógini spurt løgmann, um tað er loyvt at selja fiskiloyvi, sum persónur ella skip hava fingið frá landsstýrinum. Vilhelm Johannesen hevur sett spurningin tvær ferðir í tinginum, uttan at hava fingið svar, segði hann á tingfundi mikudagin.

### Tað er loyvt

Anfinn Kallsberg, løgmaður, sigur í viðmerking, at grundin til, at hann ikki svaraði Vilhelmi Johannesen, tá hann setti spurningin fyrstu ferð, er stutt og greitt tann, at hann fekk ikki tíð at svarað við teirri stuttu tilmáldu tíðini, hann fekk á røðarapalinum.

Men svarið upp á spurningin, sum hann var settur, er stutt og greitt: »Ja«, sigur løgmaður.

Sum lógin um vinnuligan fiskiskap er orðað í dag, ber væl til at ríka seg upp av at selja fiskiloyvi, sum ein hevur fingið fyri einki.

Tá skip verða seld í dag, hava tey at kalla einki virði, um ikki veiðiloyvi og harvið eisini fiskiloyvi fylgir við.

Talan er um tvey loyvi, sum gera, at fiskast kann við skipinum. Fyrst eitt veiðiloyvi, sum gevur rætt til yrihøvur at hava reiðskap í sjónum. Síðan eitt fiskiloyvi, sum skal fylla veiðiloyvið út. Tað vil siga at geva ásetta talið av fiskidøgum.

Tá hesi loyvi eru fingin, hevur veiðifarið virði og kann verða handlað fyri nógv meira, enn sjálvt skipið í veruleikanum er vert. Og tí hava summir ivaleyst gjørt sær dælt av.

### Verður ikki loyvt

Men tað fer landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum nú at broyta, sigur løgmaður. Nýggj lóg er á veg, og har verður hædd tikin fyri, at sonevndir kvotabarónar ikki sleppa at sita og ríka seg upp av slíkum handli.

Í nýggju lógini fer framvegis at vera gjørligt at handla við skipum á sama hátt sum í dag. Tað vil siga, at tey verða seld við loyvum.

– Annars ber als ikki til at sleppa av við eitt skip, sigur løgmaður. Men tann, sum selir skip og loyvi, kemur undir heilt aðrar og harðari treytir, enn gjørt verður í dag.

Nýggja lógin fer at siga, at verða skip og loyvi seld, skal allur vinningur av hesum koma vinnuni sjálvari aftur til góðar. Tað vil siga, at teir skulu setast í aftur onnur skip. Tað veri seg nýtt ella størri.

Verður hinvegin selt fyri at sleppa sær burtur úr vinnuni, skal avgjald leggjast á vinningin, soleiðis, at peningur, sum vunnin verður av almennari ogn, ikki bara verður stungin í lumman.

Í dag er vinningur av sølu av fiskiloyvum skattafríur. Tað er ein merkilig niðurstøða, sum onkur er komin til, sigur løgmaður, ið ikki rættiliga dugir at skilja hana.

Grundgevingin skal vera, sigur hann, at tað er ikki loyvt at selja fiskiloyvi, og tí heldur ikki ber til at skatta vinningin.

Men vit vita, at fiskiloyvi verða seld, hóast tað bara eitur, at skipini verða seld fyri ein prís, sum er kunstiga skrúvaður upp.

– Tað er verri enn so nóg gott og verður eisini broytt í nýggju lógini um vinnuliga fiskiskap, sum ætlandi kemur í gildi á nýggjárinum, lovar løgmaður.

# Landsstýrið var kunnað

**Tað er hvørki yvirbjóðing, ábyrgdarleyst ella valagn at tryggja okkara gomlu eina hækking í fólkapensiónini. Tað er okkara skylda. Og landsstýrið var kunnað um uppskotið, áðrenn fíggjarlógin varð løgd fram, sigur Helena Dam á Neystabø**

FÓLKAPENSIÓN
*Edvard Joensen*

Tað er ikki beint, tá samgongulimir siga, at teiy ikki kendu til uppskot Sjálvstýrisfloksins fyrr enn eftir, at fíggjarlógin var løgd fram. Skriv um hetta varð sent landsstýrinum tann 16. september, meðan fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram tann 28. september, sigur Helena Dam á Neystabø, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, sum eigur nógv umrødda uppskotið um hækkan av fólkapensiónini.

Helena Dam á Neystanbø vil ikki hava sitandi á sær, at hon er komin við hesum uppskotinum í yvirtíðini bara fyri at gjara út og egna upp undir val.

Hon heldur tað vera løgið, at tað bara er, tá tosað verður um tey gomlu og teirra pensiónir, at talan skal vera um valagn. Er hinvegin talan um risastórar íløgur upp á fleiri hundraðtals milliónir krónur ella flyting at almennum stovnunum og stýrum í egið valdømi, er ikki talan um valagn, vísir hon á.

Enn løgnari tykir tað Helenu Dam á Neystabø, at tað skal vera púra ókent fyri samgongulimum, at neyðugt er at hækka fólkapensiónina enn einaferð.

### Í øðrum heimi

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum heldur, at tann, sum sigur seg ikki hava frætt um ætlanir floksins um at hækka pensiónirnar, livir í eini aðrari verð ella bara ikki vil minnast tað, sum ført hevur verið fram bæði í skrift og talu.

Sjálvstýrisflokkurin heldur tað ikki vera ábyrgdarleyst at krevja hækkandi fólkapensiónir. Tvørtur í móti hevði tað verið ábyrgdarleyst ikki at kravt tað, sigur Helena Dam á Neystabø.

Pensiónirnar hava ofta verið til viðgerðar bæði í Løgtinginum og samgonguni, sigur hon. Og hvørja ferð hevur Sjálvstýrisflokkurin ført fram, at hann vil styrkja ta samhaldsføstu skipanina. Tí tey, sum eru gomul í dag, fáa als onga nyttu av eini eftirlønaruppsparing. Tað fer at ganga ov long tíð, áðrenn pengar eru tøkir til eina líkinda útgjalding.

### Finna loysn

Helena Dam á Neystabø sigur, at hon ivast onga løtu í, at ein virðilig loysn verður funnin, sum tryggjar, at eisini tey gomlu fáa lut í tí framburði, sum er í Føroyum í dag.

Øll vita, sigur hon, at alt er vorðið nógv dýrari, enn tað fyrr hevur verið. Eisini vanliga húsarhaldsvørur, sum er stórur partur av tí, pensionistarnir brúka.

Tá so er, plaga lønirnar vanliga eisini at hækka, sigur Helena Dam á Neystabø. Bara ikki hjá pensionistunum. Tær standa í stað og minka reelt í virði.

Tí vil Sjálvstýrisflokkurin hava eina hækking í fólkapensiónini, sum munar í minsta lagi líka væl sum tann, sum gjørd varð í fjør, tá umleið 1.000,- krónur vórðu lagdar oman á viðbótina.

Helena Dam á Neystabø, formaður í Sjálvsstýrisflokkinum, sigur, at flokkurin gjørdi greitt frá fyrsta degi, hendan samgongan fór til verka, at sjálvstýrisgongdin má ikki ganga út yvir tey veiku í samfelagnum. Tað eru teir breiðu herðarnir, sum skulu bera tær eyka byrðarnar, sum koma.



*Landsstýrið var kunnað um fólkapensiónsuppskotið, áðrenn fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram, sigur Helena Dam á Neystabø*